VALGREINAR

# Burðardyggan umhvørvispolitikk á dagsskránna

**Elin Lindenskov**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*
*www.lindenskov.com*



Javnaðarflokkurin vil virka fyri, at Føroyar verða millum heimsins reinastu lond. Umhvørvisvernd skal gerast natúrligur partur av uppalingini, soleiðis at hvør einstakur borgari hevur sín aktiva leiklut í umhvørvisverndini. Lokalar umhvørvisætlanir skulu setast í verk um alt landið.

Barnagarðar, skúlar, stovnar o.o. skulu eggjast til at gerast grønir stovnar. Neyvari lóggeving skal tryggja, at vit veruliga náa málinum at verða millum heimsins reinastu lond. Reint umhvørvi og burðardygg menning av okkara tilfeingi skal setast á politisku dagsskránna beinanvegin. Vilt tú hava ein nýggjan umhvørvispolitikk, so vel Javnaðarflokkin - lista C. Vilt tú vita meira, um hvat eg tikist við seinastu 4 árini, so vitja mína heimasíðu www.lindenskov.com. Har liggja hundrað tals greinar, røður o.a. frá hesum tíðarskeiði.

# Føroyar fyri allar føroyingar – eisini á útoyggj!

**Rani Nolsøe**



Um fá ár verður koyrandi undir Leirvíksfjørð. Tá verða tvær tær størstu leiðirnar hjá strandferðsluni - Vesturleiðin og Leirvíksfjarðarleiðin - spardar burtur.

Hetta frambrotið í samferðsluni skal nú eisini koma útoyggjunum til góðar.

Tí skal eitt ítøkuligt uppskot leggjast fyri komandi løgting, sum skal tryggja útoyggjunum eitt gott og framkomið samband við restina av landinum.

Í hesum sambandi eiga Strandfaraskip Landsins at gera eitt fullfíggjað uppskot um tað best møguliga sambandið til útoyggjarnar. Umráðandi er, at hetta verður gjørt í góðari tíð áðrenn Norðoyatunnilin letur upp og at uppskotið verður smíðað í samráð við útoyggjafólk.

Samstundis skal arbeiðast fyri, at tað sum Strandferðslan sparir, tá leiðin um Leirvíksfjørð verður løgd niður, ikki fellur burtur, men verður brúkt til ítøkuligar betringar av oyggjaleiðunum.

Hartil vil Tjóðveldisflokurin arbeiða fyri, ásannandi ta serligu støðuna útoyggjarnar eru í, at tað gerst ókeypis hjá útoyggjafólki at ferðast og flyta farm til og úr útoyggj.

Tí Tjóðveldisflokkurin ynskir trivna og vinnumøguleikar á útoyggjunum, ikki fallandi fólkatal og avtoftan. Vit vilja tryggja, at Føroyar skulu vera fyri allar føroyingar - eisini á útoyggj.

Veljið framtíðina - veljið Tjóðveldisflokkin

Gott útoyggjaval.

# Húslánsgrunnurin og eldraøkið

**Jaspur Vang**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Nakað av kjaki hevur verið um álitið um alternativa bústaðarbygging. Tað, sum hevur sermerkt kjakið er, at lands- og lokalpolitikarar, sum hava luttikið í kjakinum, ikki beinleiðis hava givið til kennar, júst hvørjari bústaðarbygging teir meta størsta tørvin vera á. Málið er komið hartil, at landspolitikararnir eiga at melda greitt út, hvat teir ítøkiliga ætla sær við umskipaða Húsalánsgrunninum. Duldar dagsskráir eru ov lættar at gjøgnumskoða.

**Sjálvt álitið**
Álitið leggur upp til, at ein umskipaður Húsalánsgrunnur skal gerast eitt politiskt amboð at stýra bústaðarviðurskiftunum við. Lagt verður upp til, at grunnurin skal stuðla bygging av eldrabústøðum og vanligum leigu- anparts- og ungdómsíbúðum.

**Realitetirnir**
Í og við at økini í landinum hvør sær hava ógvuliga ymiskan tørv innan oman fyri nevndu bústaðarsløg, eru lokalpolitisku ynskini til umskipaða Húsalánsgrunnin tí sjálvsagt eisini ógvuliga ymisk. Tí hava landspolitikarar og lokalpolitikarar eisini longu nú roynt at gera sína ávirkan galdandi. Hettar alt eftir, hvussu teir meta egin valdømi fáa mest burtur úr. Soleiðis er landspolitiski veruleikin nú einaferð.

Hugsa vit um niðurskurðin í blokkinum, skerjingar innan fyri heilsuverki og búskaparligu útlitini í løtuni, er tað í mínum hugaheimi óhugsandi, at ein umskipaður Húsalánsgrunnur saman við møguligum broytingum í rentustuðlinum og meirvirðisgjaldslóggávuni, verður førur fyri at nøkta tørvin innan oman fyri nevndu bústaðarsløg.

Úrslitið kann tí lættliga gerast tað, at tey valdømi í Føroyum, sum í kraft av sterkastu landspolitisku - og landsumsitingarligu umboðanini, framman undan standa sterkast fíggjarliga, verða før fyri at fíggja komandi alternativa bústaðarbygging og harvið fáa so at siga allan ágóðan av umskipaða Húsalánsgrunninum. Úrslitið kann tí enn einaferð gerast tað, at landspolitiska vælvildin lutfalsliga og í enn størri mun styrkir tey økini í landinum, sum framman undan njóta mest av landspolitiskari vælvild. Hettar hevði verið beinleiðis ímóti tilráðingunum í eitt nú Økismenningarálitinum.

**Eldraøkið**
Tað liggur fast, at eldraøkið er ein landsuppgáva, eins og allir teir politisku flokkarnir undan seinasta løgtingsvali vóru samdir um, at eldraøkið liggur í vanrøkt og at tørvur m.a. er á eldraíbúðum og røktarheimsplássum. Hóast tað hava kommunurnar kring alt landið í áravís átikið sær at byggja røktarheim og sambýlir, eins og kommunurnar reka hesi.

Framskrivingar av samansetingini av fólkinum í Føroyum vísa - eins og í londunum uttan um okkum - at lutfallsliga talið av eldri fólki fer at økjast munandi komandi árini.

Tí hevði tað veri skilabest, um virðini í Húsalánsgrunninum saman við neyðugum almennum veitingunum, so ella so vórðu nýtt til at umsita og dagføra bústaðartørvin á eldraøkinum.

Út frá m.a. nágreiniligum framrokningum av fólkasamansetingini í einstøku økjunum í landinum komandi árini og við atliti til fíggjarorkuna í einstøku økjunum, átti at verið gjørd ein raðfesting og ein býtislykil. Soleiðis hevði tað verið møguligt hjá landspolitiska myndugleikanum miðvíst og rættvíst at bøtt um støðuna á eldraøkinum.

Tá eldraøkið er dagført, hevði tað møguliga verið hóskandi at tosa um at leggja eldraøkið út til kommunurnar.

Vit mugu burtur frá tilvildarligu siðvenjuni, sum loyvir tilvildarligum landsstýrismonnum, at reka lokalan flokspolitikk.

Lat okkum tí kalla ein spaka fyri ein spaka og loysa eina uppgávu í senn.

# Kvinnur, gentur og læknar verða dømd sum mordarar

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Nú er takt nóg leingi, tað má finnast fleiri í Føroyum, sum hava dirvi at tala at Miðflokkinum, sum dømir kvinnur, gentur og læknar sum mordarar.

Hvat er hetta fyri ein andstyggilig framferð, at døma sín næsta fyri mordara,- ikki eiti á næstrakærleika, má sigast.

Hví er tað altíð eldri mannfólk sum spæla serfrøðingar viðvíkjandi fosturtøku, hesir sum ikki hava ánilsi av hvat tað fyrigongur í einum kvinnukroppi, teir samanlíkna hesar kvinnur og gentur við Hitler og Saddam Hussein, sum drupu ósek fólk í hópatali og so brúka teir tað í sínum politiska valstríði.-- Skamm fái teir

Tað kann ikki verða nakar ivi um, at tað eru kvinnurnar, sum ráða yvir egnum kroppi og ikki einsporað gomul mannfólk og onnur, sum halda seg verða serfrøðingar og dómarar.

Hetta er so mín persónliga meining.

# Ríkisfelagskapurin er framtíðin - fullveldisskútan kollsilgd

**Annfinn Brekkstein**
*valevi Sambandsflokksins í Suðurstreymoy*



Nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkurin sigur m.a., at vit skulu varðveita ríkisfelagsskapin. Aðalmálið hjá sambandflokkinum er at menna føroyska fólkið, soleiðis at tað støðugt verður ført fyri at møta teimun avbjóðingum, sum umheimurin til eina og hvørja tíð setir.

Stabil fíggjarviðurskifti eru fortreytin fyri vælferð- ini hjá tí einstaka føroyinginum. Hesi viðurskifti eru best tryggjaði innan fyri ríkisfelagskapin.

At útbyggja eitt oyggjasamfelag er sera kostnaðarmikið. Ríkisfelagsskapurin/ blokkurin, hava verið við til at útbygt okkara infrastruktur, so at fólk kunna ferðast úr einum staði til annað fyri at vinna sær til lívsins uppihald.

Yvirskipaða málið hjá sambandsflokkinum vil til eina og hvørja tíð vera, at menna føroyska samfelagið innan fyri ríkisfelagskapin. Hetta polittiska stavnhald verður sett í eini ásannan av, at størri og betri úrslit verða rokkin í samstarvi og felagskapi enn í sjálvdrátti og avbyrging.



VALGREINAR

# Gjøgnumskygni, frælslyndi og mannarættur

**- grundin undir einum fólkaræðisligum, framkomnum Føroyum.**

**Rói Egholm**



Føroya fólk og Føroya land hava krav uppá, at tey 32 tingfólkini, sum verða vald inn á ting, arbeiða betur saman, enn vit hava sæð hesi seinastu árini. Eisini eigur fremsta mál politikaranna at vera at arbeiða til frama fyri landið og allar borgarar, sum her búgva.

Øll kunnu fáa tey bestu plássini á portalinum, býbussum, á hýruvognum ella kunnu bíleggja bestu plássini í bløðunum, men við tí er ikki sagt, at vit fáa teir bestu politik-ararnar, sum soleiðis vinna sær atkvøður og kanska sess á tingi. Makt og ráð at gjalda fyri eitt valstríð er ikki tað sama, sum at vit fáa dugnaligar, góðar og visionerar politikarar. Livibreyðspolitikarin gerst ov sjónskur, og visiónir og idealisma hvørva í mjørkanum av viljanum til makt.

Gjøgnumskygni og greiðar mannagongdir eiga at eyðkenna politiska arbeiðið, og eingir rossahandlar ella maktstríð eiga at koma fram um, hvat er best fyri einstaka borgaran og landið. Trygdin hjá tí einstaka og virðingin fyri tí einstaka, uttan mun til áskoðan, eigur at vera í hásæti, tí uttan hesi sjálvsøgdu mannarættindi hjá einstaka føroyinginum byggja vit ikki eitt frælslynt og framkomið samfelag, sum hevur virðing úti í heimi og kann samstarva við lond kring allan heim.

Minsta krav vit sum borgarar kunnu seta framtíðar politikarum okkara er, at grundleggjandi øki í samfelagnum virka, so einstaklingar og bólkar kunnu fáa tryggar, góðar og gróðrarfremjandi karmar at virka í.

**Vinnulív leyst av politisku skipanini besta trygdin fyri framburði og vælferð**
Vantandi vinnulívspolitikkur er orsøkin til, at høvuðsvinnan á landi ikki er kappingarfør at framleiða fiskaúrdráttir úr føroyskari rávøru. Hetta er sera álvarsligt fyri føroyska samfelagið, og vísir tað seg eisini nú, at ongantíð áður er farin so nógvur fiskur óvirkaður av landinum.

Føroyska samfelagið er soleiðis samansett, at fiskavirking á landi er ein týðandi inntøkukelda hjá føroyska samfelagnum, bæði fyri familjur og fyri landsbúskapin.

Tað er einki minni enn ein vanlagna, at tað almenna er høvuðseigari í fiskivinnuni á landi. Tað almenna eigur meir enn 70% av eginognini í fiskivinnuni á landi, og hetta er ikki í samsvari við nútímanshugsan innan vinnuskipanir í nútímans samfeløgum. Tað er prógvað ferð eftir ferð, at lønsemið ikki er optimalt, tá ið tað almenna og vinnulívið eru samantvinnað..

Vit eiga sum skjótast, tó væl fyriskipað, at fáa greiðan skilnað ímillum tað almenna og vinnulívið. Tað er ein sannroynd, at við tí vantandi politisku leiðslu á vinnuøkinum, sum vit hava livað við undir leiðslu fólkafloksins hesi seinastu árini, er tann almenni parturin í vinnulívinum bert vaksin.

Tað er umráðandi, at politiska skipanin og Vinnumálaráðið ganga á odda fyri at tryggja, at vinnulívskarmarnir eru teir røttu, soleiðis at hesin parturin av samfelagshjólunum koyrir optimalt. Her má havast í huga, at vinnan er samansett av nógvum ymsum pørtum og at týðandi partar sum arbeiðsgevarar, umhvørvi, peningakervi og ikki minst arbeiðsfólkið mugu øll vera við í tí miðvísa arbeiðinum.

Vinnulívið kann ikki liva við, at politiska skipanin bert samskiftir við útvald vinnuvirkir. Heldur ikki kann vinnulívið liva við, at arbeiðsgevarar og arbeiðsfólkið bert samskiftir í samband við sáttmálasamráðingar. Samskiftið og samarbeiðið átti at verið sera tætt í sjálvum sáttmálaskeiðinum, fyri á tann hátt at arbeitt við felags áhugamálum og visiónum partanna millum, heldur enn bert at hugsa um løn og setanartreytir.

Framburður er treytaður av, at allir partar klára at samarbeiða, hóast teir ikki eru fullsamdir í øllum, sum er teirra millum.

Lønsemi er treytað av samarbeiði og framburði. Tað er lønsemið í vinnuni sum er grundarlagið undir vælferðarsamfelagnum, og sum skal verða við til at gjalda tað.

**Fiskiloyvini ogn Føroya fólks**
Besta lønsemi í fiskivinnuni á sjógvi fæst ikki, við at ræðisrættindini tilvildarliga verða latin vinnurekandi, uttan at tryggja sær, at tað eru tey mest kappingarføru feløgini ella persónarnir, sum sita á loyvinum, og at úrtøkan av loyvinum verður gagnnýtt skilagott og lønsamt av loyvishavaranum.

Tað er umráðandi, at tað almenna bjóðar út fiski- og aliloyvir til leigu fyri hægst bjóðandi og í eitt avmarkað áramál. Allir føroyingar skulu sleppa framat at bjóða upp á loyvini við treytum um, at loyvini ikki verða parkerað og kunnu tulkast/fatast sum ogn og kunnu handlast víðari, men heldur verða gagnnýtt optimalt á skynsamiligan hátt.

Hevði ein slík skipan virkað við støði í fríum marknaðarkreftum, har allir borgarar eru eins fyri lógini, so hevði avkastið verið munandi størri og hevði verið ein týðandi inntøkukelda hjá landskassanum, sum aftur hevði verið ein trygd undir einum vælvirkandi vælferðarsamfelag, har allir borgarar høvdu trygg kor at liva undir.

**Er rætt atborið, styrkir kapitalur uttanífrá føroyska búskapin**
Ein tryggur og væl virkandi vinnulívspolitikkur, har gjøgnumskygni og greiður skilnaður er millum politisku skipanina og vinnulívið, gevur møguleikar fyri øktum kapitalíløgum uttaneftir. Um vit høvdu havt rættan vinnulívspolitikk og ræðisrættindini til okkara tilfeingi vóru betur skipað, so kundu vit óttaleys og við møguleikum fyri nógv størri rásarúmi og útbyggingarmøguleikum loyvt kapitali uttanífrá at virkað frítt í Føroyum.

Kapitalur uttanífrá kundi sett munandi ferð á búskaparhjólini og verið við til at skapt stór samfelagsvirðir, sum høvdu komið øllum føroyingum væl við.

Men hetta er treytað av, at vit ikki lata ræðisrættindi til ognir Føroya fólks fara á privatar hendur, men at vit hinvegin í fríari kapping taka leigugjald fyri brúksrættin. Við optimalum vinnukarmum átti áræðið, dugnaskapurin og arbeiðsinnsatsurin hjá fiskivinnuni á sjógvi at verið avgerandi fyri, at tey best riknu feløgini fingu besta avkastið.

**Rættir karmar at virka í eru leiðin fram**
Spurningurin er ikki, um ein politikari er mest sjónligur ella hoyrist best í einum valstríði, men heldur eiga vit at krevja, at framtíðar politikarin arbeiðir fyri, at føroyska samfelagið fær teir karmar at virka í, sum tænir samfelagnum best.

Við frílyntum vinnukarmum, har politikkur er politikkur og vinnulív er vinnulív, kunnu vit fáa samfelagshjólini at mala við tí ferð, sum passar til Føroyar og føroyingin.

Tað er hesin vinnubúskapur, sum skal vera grundarlagið undir tí føroyska búskapinum og harvið føroyska vælferðarsamfelagnum.

Eg ynski at Føroya Løgting í framtíðini kann fara at tingast um, hvussu vit skipa hetta samfelagið fyri allar føroyingar, høgar sum lágar, vinnumál, almannamál og privatmál, tingast um, hvussu pláss verður gjørt fyri øllum samfelagsbólkum, eisini minnilutabólkum.

Eg ynski, at Føroya Løgting aftur kann fara at reka realpolitikk, og arbeiða fyri, at føroyingar savnaðir og sum ein rødd arbeiða ímóti sjálvbjargni. Skapa umstøður og rættar karmar, so vit fáa sum mest burtur úr tí dýrabærasta tilfeingi, ið vit eiga, nevniliga Føroya fólki: einum vælútbúnum ungdómi, einari dugnaligari, arbeiðssamari og vælvirkandi arbeiðarafjøld, hondum sum undan fóru og sum við sínum lívsroyndum og teimum virðum, sum tey hava skapt í samfelagnum, trygt kunnu byrja eina nýggja tilveru, har framvegis er brúk fyri teirra royndum og kreftum, men har samfelagið tryggjar teimum góð eftirlønarár. Fólkið, ið her býr, er og verður altíð grundarlagið, sum samfelagið byggir sína framtíð uppá. Fólkið er fortíðin, nútíðin og framtíðin.

Eg ynski, at Føroya Løgting kann tingast um, hvussu vit verja okkara sosialu skipanir, sum longu eru uppbygdar og hvussu vit kunna betra hesar skipanir, soleiðis at tær svara til tørvin hjá Føroyum.

Eg vóni ikki, at Føroya Løgting eisini eftir valið hin 20. jan. 2004 fer at keglast og klandrast um smámál, um vegastubbar, um Ginusøgur ella at brúka 2-3 dagar at kjakast um avgjald á bommpakkum, keks og plastikkposum. Hatta eru týðandi mál fyri tey, sum beinleiðis varða av teimum, men tey hoyra ikki heima í tinginum og á røðarapallinum har. Tingið skal skapa karmarnar og tryggja øllum borgarum mannsømilig og trygg kor at liva undir, avskeplaður moralur og trongskygdar lívsáskoðanir hoyra ikki einum framkomnum, frílyntum og fólkaræðisligum samfelag til.

Vónandi verður valið komandi byrjanin til, at vit fáa samstarvsvilja, virðing fyri lóg og rætti og trygd hins einstaka í hásæti. Har moralur og etikkur eru grundað á rættvísiskenslu og virðing fyri mannarættindum og ikki minst har lógin er eins fyri allar borgarar í landinum.

Vit lata nú jólafriðin søkka yvir land og fólk og mín vón er, at hugnin og hitin av næstrakærleika finnur sína leið inn í hvønn krók í samfelagi okkara. Gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár ynski eg øllum.

# Fólkaræði ella vavgreytur

**Jógvan Arge**
*Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Fólkaræðið er í fokus. Men eitt eru tær politisku stevnuskráirnar og tær kósir, sum flokkarnir seta. Annað er at fremja tað politiska starvið í verki til frama fyri fólk og land.

Hálvtannað ár á løgtingi hevur sannført meg um, at tað politiska arbeiðið á løgtingi má styrkjast. Meiri dygd má fáast í løgtingsviðgerðirnar.

Tey, sum fylgja við orðaskiftunum á tingi, hava mangan hug at meta orðaleikin sum glantrileik. Tey hava ilt við at fáa eyga á álvaran og kenna seg ikki trygg við tey úrslitini, sum koma burturúr.

Eg skilji tey. Viðgerðirnar snúgva seg mangan um alt annað enn sjálvi málini.

Tá fíggjarlógin var fyri í heyst, vórðu kontur og málsøki vavd saman í ein slíkan vavgreyt, at hvørki høgur ella lágur fekk skil á, hvat tingmenn vildu og viðgjørdu. Tað tænti hvørki almenninginum ella løgtinginum.

Slík støða elvir til líkasælu. Gjógvin millum tingið og almenningin gerst størri, og álitið millum partarnar viknar. Tað er álvarsamt fyri fólkaræðið. Tí eigur nakað at verða gjørt við hetta.

**Eg havi tvey uppskot:**

1. Løgtingsarbeiðið verður lagt soleiðis til rættis, at tey, sum lýða á viðgerðirnar í tinginum, hava møguleika fyri at skilja, hvat fyriferst. Hetta gerst eitt nú við at greina viðgerðirnar meiri sundur og syrgja fyri, at tingfólk halda seg til evnið. Tað er ein fyritreyt fyri áliti millum ting og almenning.
2. Løgtingsins formansskapur tekur stig til at tey, sum hava áhuga fyri politiskum starvi, fáa høvi til sjálvbodna skúling innan fólkaræði og politiskt starv. Løgtingið eigur at stuðla upp undir slíka skúling bæði innan teir politisku flokkarnar og á skúlum.

Tí betur luttakararnir í politisku skipanini sum heild eru fyri til at røkja tað politiska arbeiðið, betur verða viðgerðirnar og úrslitini. Tað fremur gott og álítandi fólkaræði.

X við E.